

## Ólavsøkukórið venur

Felagssangurin á ólavsøku verður sum vant á midnátt ólavsøkudag, og fyrireikingarnar hjá kórinum eru byrjaðar. Undir leiðslu av Sunleifi Rasmussen hava fyrstu venjingarnar verið, men frá fyriskiparunum verður sagt, at tað var ynskiligt, at fleiri fólk vóru í kórinum. Øll áhugað kunnu taka lut, og verður vant í Læraraskúlahøllini leygardagin frá klokkan 16 til 18, og sunnudagin frá klokkan 16 til 19. Eisini verða venjingar á skránni sunnudagarnar 20. og 27. juli.

# Eitt tað størsta á norðaru jarðarhálvu

**Sameiningin millum Vónina og norska Refa Frøystad Group skal útvega føroyska felagnum fleiri bein at standa á**

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað er eitt stórt tak, sum leiðslan í partafelagnum Vónini hevur valt at taka við at leggja felagið saman við norska Refa Frøystad Group. Eginpeningurin í nýstovnaða móðurfelagnum, sum hevur fingið navnið VON, er góðar 114 milliónir krónur. Hvussu stór tann føroyska íløgan ert, vil leiðslan ikki siga, men tað er greitt, at talan er um eina av teimum størstu, privatu føroysku íløgunum uttanlands nakrantíð.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Pf. Vónin ger íløgur uttanlands. Fyri nøkrum árum síðani keypti felagið 22 prosent av stóra íslendska trol- og nótavirkinum Hampiðjan. Tann íløgan var 67 milliónir krónur. So stór er íløgan í Refa Frøystad Group sum skilst ikki.

- Vit hava avtalað, at vit upplýsa ikki talið, men hetta er eitt stórt tak og ein tann størsta íløgan, sum ein privat fyritøka hevur gjørt uttanlands, sigur Hjalmar Petersen, sum er konsernstjóri í VON.

### Kreppa 5. hvørt ár

Tann føroyski marknaðurin hevur í mong ár verið høvuðsmarknaðurin hjá Pf. Vónini, men tað er í ásannanini av, at hann er ov lítil og ikki minst ov óstøðugur.

- Royndirnar vísa, at vit hava kreppu í føroysku fiski- ella alivinnuni fimta ella sætta hvørt ár, og tí noyðast vit at fáa okkum fleiri bein at standa á fyri at tryggja felagnum ein javnan umsetning, sigur Hjalmar Petersen, sum væntar sær nógv av sameiningini við júst Refa Frøystad Group.

- Tað hevur víst seg, at vit hava havt ilt við at fáa fótin fastan á tí norska marknaðinum, sum er nógv tann størsti í Norðuratlantshavinum. Hinvegin er Refa Frøystad Group ein viðurkend fyritøka í norsku fiski- og alivinnuni, so á hendan hátt vænta vit at fáa meiri burtur úr norska marknaðinum, sigur konsernstjórin.

### Hóska væl saman

Tað er ikki av tilvild, at leiðslan í Pf. Vónini valdi at sameina felagið við júst Refa Frøystad Group, sum er í kenda fiskivinnubýnum Fossnavåg sunnan fyri Aalesund.

Norska felagið er eitt av teimum stóru, tá tað snýr seg um at gera nótir til nótaskip og til alivinnuna, og tann marknaðurin er sera stórur í Noregi.

Hinvegin hevur norska virkið ikki gjørt flótitrol, sum Vónin hevur drúgvar royndir við. Hjalmar Petersen sigur, at tað hevur víst seg at vera trupult hjá Vónini at sleppa inn á norska marknaðinum við sínum trolum, men hann væntar, at sameiningin kann lata hurðarnar upp.

- Tað er eitt stórt tak, sum vit hava tikið, men tað er neyðugt, skulu vit økja og menna virksemið, sigur stjórin.



*Hjalmar Petersen er konsernstjóri í móðurfelagnum Pf. VON*

### Fakta um Pf. VON

**Eigarar:** Spf. Kerið 38%, A/S Havila 23%, TF Holding 22%, Frøystad familjan 17%
**Eginpeningur:** 114,4 milliónir krónur
**Nevnd:** Klaus Rasmussen (formaður), Olaf Olsen, Jón Rasmussen, Per Sævik og Fríðrik Jóhannsson

# Við flaka millum londini

*Í síðstu viku var niðurlendski sleipibáturin "En Avant" á Havnini. Við sær hevði hann ein stóran flaka. Í Íslandi skal ein stórur krani setast á flakan, og síðani gongur leiðin aftur til Niðurlanda*

